Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Avloysari til Verkhúsið Virkni

Eitt starv sum avloysari á Verkhúsinum Virkni er leyst at søkja til setan beinanvegin ella skjótast tilber. Talan kann møguliga verða um setan í eitt longri tíðarskeið.

Verkhúsið Virkni er ein dagsstovnur, har vit í einum vælskipaðum pedagogiskum umhvørvi geva kropsliga og sálarliga menningartarnaðum ítøkilig amboð til at menna sítt lívsvirði og sjálvsvirði.

Starvið er krevjandi bæði kropsliga og sálarliga, men er samstundis ein støðug pedagogisk avbjóðing.

**Setanartreytir:**
Talan er um 40 tímar um vikuna.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Veru Bjørgvin, á telefon 221233.

**Umsókn:**
Hevur tú hug og áræði at royna teg á einum virknum arbeiðsplássi, so skriva okkum eina umsókn, og tú hoyrir frá okkum aftur.
Umsókn við hjáløgdum prógvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:

Verkhúsið Virkni
Berjabrekka 2
FO- 100 Tórshavn.
Stílað: Vera Bjørgvin

**Umsóknarfreist: 2. mars 2007.**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

Starvslýsing

Heimatænastan

## Feriuavloysarar til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum at arbeiða sum feriuavloysarar úti hjá brúkarum og inni á eldrasambýlunum í Heimatænastuni í Suðurstreymoy frá 15. juni 2007 til 31. august 2007.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Metu av Fløtum, økisleiðara, á tlf. 31 72 49.

**Løn- og setanartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Nærverkið
Heimatænastan
Stílað Meta av Fløtum, økisleiðari
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 5. mars 2007**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

Endurlýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið í Stoffalág 64

Talan er um fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Arbeitt verður í dag-, náttar- og vikuskiftisvaktum. Starvið verður sett 1. apríl 2007 ella eftir nærri avtalu. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Sambýlið í Stoffalág 64.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bárð Sigurðsson, leiðara, á tlf. 214664.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:
Sambýlið í Stoffalág
Stoffalág 46
100 Tórshavn
Stílað: Bárður Sigurðsson, leiðari
**Umsóknarfreist: 2. mars 2007.**

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.
Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.
Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sátttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Les meira um starvið á www.naerverk.fo/ leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Fakligur dagur fyri alivinnuni

Føroya Havbúnaðarfelag skipar fyri einum fakligum degi fyri starvsfólk í alivinnuni og teimum, sum hava áhuga fyri vinnuni tann **23. februar 2007 kl. 9.00.**

Dagurin byrjar **kl 9.00 á Hotel Føroyum** og hildið verður fram til uml. kl 16.00. Á skránni eru fyrilestrar og høvi verður at møta samstarvsfeløgum. Sí annars skrá á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

**Kostnaður**
400 kr fyri limir í Føroya Havbúnaðarfelag og 800 kr fyri ikki limir.

Tilmelding fer fram um heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari · FISKAALING P/F · FØROYA BANKI · KJ HYDRAULIK

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo